tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 140 Mikudagur 24. juli 1996 70. árgangur Krónur 7,00

*Kristianna Høgnesen, nevndarlimur í Tórshavnar Ítróttarráð:*

## Halgar alla sína frítíð til ítróttar-arbeiði



Baksíðan

**Góð tíðindi undan ólavsøku:**

# Lønarinntøkan vaksin 200 mill. kr.

Síða 4

*Alt klárt til at bora í Lopra*

## Eykalutur til Lopransborin við flogfari

Síða 9

*Spennandi í kvøld:*

## Gí hevur fyrireikað seg sum yrkisspælarar gera

Síða 13

## 115 fleiri enn á nýggj-árinum

Enn flyta fleiri av landinum, enn tað koma aftur, men fólkatalið veksur kortini, tí tað verða fødd so nógv børn nú



*Ronja Karinsdóttir Dam er bert eitt av teimum mongu, fittu børnunum, sum eru komin til verðina í hesum árinum* *Mynd: jan*

Síða 4

VIT KOYRA ALT SLAG AV
VØRUKOYRING
FLYTING ÚR FØROYUM TIL FØROYA
VIT HAVA FLYTIKASSAR, GOYMSLU OG KAPPINGARFØRAR PRÍSIR
TILBOÐ VERÐA GIVIN
O.A. VØRU-KOYRING
17727 · 88727

# Bíðaðu eftir eykaluti til Lopra-borin

Áki Bertholdsen

Loksins tykist vera klárt at seta boran ígongd í Lopra.

Teir vóru klárir at bora tíðliga í gjár, men tá varnaðust teir, at alt var ikki, sum tað skuldi og at ein eykalutur skuldi til.

Eykaluturin varð heimanvegin bilaður.

Hann skuldi koma við flogfarinum seinnapartin í gjár.

Bátur skuldi liggja fyri pakkanum á Oyragjógv, og vestmannamegin skuldi bilur standa klárur at flyta hann til Havnar, haðani hann skuldi suður við Teistanum.

Roknað var við, at Teistin var noyddur at bíða einar 15 minuttir eftir pakkanum.

So var Teistin heldur seinur av Havnini aftur í gjárkvøldið vita tey, sum kanska illneitaðust við hesum orsøkina hesuferð.

Seinni í gjárkvøldið var so pakkin komin á boriplássið, og teir skulu beinanvegin fara at seta hann uppá.

So skuldi verið klárt at bora og farast skuldi ígongd beinanvegin, alt varð klárt.

Eftir ætlan verður borað einar 3-4 metrar um tíman, men kanska fer tað at ganga heldur seinni at bora ígjøgnum tað harða basaltið.

Tað er nógvur flutningur til og frá boriplássinum. Alt, sum skal brúkast, verður flutt á plássið so hvørt og alt, teir eru liðnir at brúka, verður flutt avstað aftur beinanvegin.

Men eftir hvat skilst hava ongir trupulleikar verið av flutninginum, sum hevur gingið bæði skjótt og væl.

### Strangir

Tað er ógvuliga strangt eftirlit við hvør er á boriplássinum og ansað verður væl eftir, at fólk ikki eru á plássinum, sum einki hava at gera har.

Tað máttu undirritaði sanna, tá ið hann um vikuskiftið, tá ið hann ætlaði sær at taka nakrar myndir til Sosialin.

Men har var eingin bøn. „No pictures inside“, – ongar myndir innanfyri, segði stjórin á boranum Frede Torpe og eg varð vinarliga, men avgjørdur biðin um at halda meg uttanfyri gyrðingina.



*Borin sær øgiligur út í mjørkanum. Myndin er tikin um vikuskiftið. Sera strangt eftirlit er við, hvør er á plássinum og eingin sleppur inn, sum ikki hevur ørindi hagar.*

## Vestanstevna

**Fimm áttamannaførur hava klagað um róðurin á Vestanstevnu**




Føroyskur dansur á Ólavsøku
í HOLLYWOOD
N. Finsensgøta 20